BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Children and Education

# Landsroyndin 2025

Próv STOVAN NÁM

Fólkaskúlalógin áleggur skúlunum at luttaka í landsroynd í føroyskum, støddfrøði og náttúru og tøkni. Henda uppgávan er løgd Próvstovuni at fyriskipa, og ger hon tað í tøttum samstarvi við uppgávunevndir og skúlan.

Skipað var fyri landsroynd í døgunum 8.- 11. apríl. Samskiftið við skúlarnar í sambandi við royndina gekk væl, og er tað ein av hornasteinunum í, at royndin kundi fremjast.

Eins og tvey tey seinastu árini varð royndin í ár hildin yvir 4 dagar við einari lærugrein hvønn dagin. Hetta hevur eydnast væl, og er hetta tí ein leistur, sum hildið verður fram við.

Landsroyndin hjá 4. flokki er skipað soleiðis: Lesifatan 45 min., staviførleiki 45 min., støddfrøði 45 min. og náttúra og tøkni 45 min.

Landsroyndin hjá 6. flokki er skipað soleiðis: Lesifatan 45 min., staviførleiki 45 min., málførleiki 30 min., støddfrøði 60 min. og náttúra og tøkni 60 min.

Miðað verður eftir, at royndirnar ávirka gerandisdagin minst møguligt. 4. flokkur byrjar kl. 8.15 á morgni, og 6. flokkur byrjar kl. 10.00. Skúlin skipar karmarnar kring royndina, soleiðis at næmingarnir kenna seg tryggar, t.d. at royndin er í flokshølinum, og at lærarin í lærugreinini er hjástaddur. Próvstovan hevur lagt seg eftir, at tað skal vera góð tíð hjá næminginum at finna seg til rættis, tí byrjar royndin í 4. flokki kl. 8.15, og ein heilur tími er lagdur millum royndirnar hjá 4. og 6. flokki.

Royndin er talgild, og einstaki lærarin kann síggja fyribilsúrslitini hjá sínum næmingum stutt eftir, at royndin er liðug. Tá allar royndirnar eru lidnar, eftirkannar Próvstovan úrslitini, og ger hagtølini til skúlarnar. Vanliga hevur tað verið soleiðis, at skúlin fær miðalúrslit fyri landið og fyri skúlan og úrslitini hjá einstøku næmingunum.

Fyri at geva skúlunum eitt so gott amboð sum gjørligt, hevur Próvstovan í eina tíð arbeitt við at betra um hagtølini, ið skúlarnir fáa. Hetta hevur tikið tíð, og vónandi fara nýggju hagtølini at gera arbeiðið hjá skúlunum lættari, tá eftirmetast skal.

Skúlarnir fáa framhaldandi tey hagtøl, sum teir áður hava fingið, men í ár hava skúlarnir harumframt fingið yvirlit yvir allar flokkar hvør sær, yvirlit yvir, hvørjar uppgávur hava gingið væl og hvørjar minni væl, hvussu spjaðingin er í flokkinum, og hvussu hevur gingið hjá skúlanum yvir tíð.

Miðalúrslitið í ymsu lærugreinunum í ár er hetta:

**Royndarúrslit 4. flokkur:**

| Lærugrein | Miðalúrslit |
|---|---|
| Føroyskt, lesifatan | 73% |
| Føroyskt, staviførleiki | 69% |
| Støddfrøði | 80% |
| Náttúra og tøkni | 67% |

**Royndarúrslit 6. flokkur:**

| Lærugrein | Miðalúrslit |
|---|---|
| Føroyskt, lesifatan | 64% |
| Føroyskt, staviførleiki | 74% |
| Føroyskt, málførleiki | 67% |
| Støddfrøði | 68% |
| Náttúra og tøkni | 67% |

Sum sæst omanfyri, so eru úrslitini í % av samlaða uppgávusvarinum. Tað vil siga, at um eitt avrik verður víst sum 60%, so eru 60% av svarunum røtt. Tað er týdningarmikið at hava í huga, at endamálið er ikki at geva næmingunum eitt talmet, og skulu hesi tøl tí setast í mun til tað, sum næmingarnir megna, og í mun til, hvussu uppgávurnar eru skipaðar.

Tað kunnu vera stór lop í miðalúrtøkuni frá ári til ár. Tá er neyðugt at hyggja at, hví so er, og hvussu úrslitini hátta seg í mun til undanfarin ár. Eisini ber til at fylgja við í, hvussu flokkarnir og næmingarnir klára seg yvir tíð. Næmingarnir í 6. flokki í 2025 gingu í 4. flokki í 2023, og til ber at fylgja við í, hvussu hevur gingist teimum, og meta um, hvar skal hjúklast um, og hvar skal setast inn.

Lærarin kennir næmingarnar best og er tí best førur fyri at meta um úrslitið. Ein almenn/generel samanbering millum úrslit í royndum sum hesari eigur altíð at gerast við størsta fyrivarni. Tað eru ikki somu royndir, sum næmingarnir taka, tí royndirnar eru tillagaðar øll árini, og torleikastigið broytist.

Tað er týdningarmikið at leggja dent á, at landsroyndir ikki siga alt um førleikan hjá næmingunum. Royndirnar geva eina ábending um, hvussu støðan er. Úrslitið skal nýtast sum partur av samlaðu eftirmetingini í skúlunum við atliti at innihaldi, háttalagi o.ø. til tess at betra um undirvísingardygdina og úrtøku næminganna.